KÍF-StÍF 26-24 (13-10):

# Tung frávera

**StÍF mátti vera fleiri av mest týðandi leikarunum fyriuttan til dystin móti KÍF, og hetta lótu kollfirðingar sær ikki siga tvær ferðir**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast StÍF eftir fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini hevur ein lítlan fyrimun í dystinum móti VÍF, so er einki at taka seg aftur í, at tann sigurin í nógvar mátar kann vísa seg at vera sera dýrt keyptur.

Longu undan teirri uppgerðini var støðan tann, at liðið mátti vera Svein Justinussen fyriuttan, og eftir at Marian Cirloganescu varð borin av vøllinum, og Mihai Marinescu síðani fekk reytt kort, stóð greitt, at tað fór at verða eitt sera skert strandalið, sum sunnudagin skuldi royna seg á útivølli móti KÍF.

## Ov tungt at taka

Og tað vóru heldur ikki lidnir nógvir minuttur av dystinum í Hoyvíkarhøllini, fyrr enn tað varð staðfest, at talan fór at gerast um tunga uppgávu hjá StÍF.

Heimaliðið leyp nevnliga avstað alt fyri eitt, og áðrenn VÍF veruliga var komið fyri seg, høvdu kollfirðingarnir longu langað sjey bóltar í kassan aftan fyri Rasmus Magnusson. Strandingarnir royndu at koma afturí aftur, men gloppið upp til mótstøðuna var ov stórt. Kollfirðingarnir stríddust manniliga fyri at verja leiðsluna, og hartil var tað heilt góða lagið á Óla Christian Dhurhuus, soleiðis at StÍF ikki kom ov lætt til nakað sum helst.

Í seinna hávleiki var tó fleiri ferðir líkt til, at strandingarnir hóast alt skuldu fáa nakað burturúr. Teir vunnu seg upp á javnt, og teir hóttu við at fara framvið, men hetta seinasta eydnaðist teimum ongantíð. Kollfirðingar høvdu alla tíðina meira eftir í sær, og teir megnaðu alla tíðina at geva eitt skump afturat, tá støðurnar gjørdust ov spentar, og tá teir av álvara settu trumf á seinastu løtuna, var ikki stórt meira hjá StÍF at gera.



*Kollfirðingar stríddust manniliga í samfullar 60 minuttir, og hesa ferð fingu teir eisini løn fyri stríðið*
*Savnsmynd*

## Koppaði talvuni

Og einki er at taka seg aftur í, at sigurin hjá KÍF á ein hátt koppaði stigatalvuni.

Her vóru strandingar undan dystinum næstir Kyndli, men tapið viðførir í fyrsta umfari, at tað nú eru fýra stig upp til grøna oddaliðið. Og við tveimum komandi dystum móti VÍF, harav annar er í steypakappingini, kundi væl hent seg, at hesin munurin gjørdist enn størri.

Og hartil, so skulu strandingar nú eisini til at líta nakað niðureftir á stigatalvuni. Hálveringin av stigunum hevur sjálvsagt havt við sær, at munurin niður eftir eisini minkaði, og sum støðan er nú, so standa kollfirðingar brádliga við einum góðum møguleika at leggja seg út í heiðursmerkjastríðið. Her hava teir ikki verið staddir í eini tíggju ár ella so, men VÍF, StÍF og Neistin eru bert ávíkavist eitt, tvey og trý stig burturi.

Hvussu stórum álvara hóttanin frá KÍF skal takast í, fæst helst ein greið ábending um komandi vikurnar. Fyrst er talan um grannauppgerð móti hoyvíkingum, áðrenn KÍF hevur heimadyst móti Neistanum, og fáast stig burturúr hesum báðum dystunum, tykist alt standa púrasta opið í so máta. Útgangsstøðið varð í øllum førum skapt sunnudagin, og fyri KÍF man tað ikki telja so nógv, at StÍF mátti vera fleiri leikarar fyriuttan. Tann leiklutin hava kollfiriðingar sjálvir átt stóran part av grundspælinum.

### Dysturin í tølum

**KÍF-StÍF 26-24 (13-10)**
**Málskjúttar**
**KÍF:** Damir Oros 8(2), Regin Petersen 6, Gert Hansen 5, Petur Martin Poulsen 4, Teitur Joensen 2, Rógvi Weihe 1
**StÍF:** Alexandur Johansen 11(4), Artur Johansen 7, Leivur Justinussen 2, Andre F. Danielsen 2, Jón Rasmussen 1, Sverri Justinussen 1
**Brotskøst:** KÍF 3, StÍF 5
**Útvísingar:** KÍF 7, StÍF 3
**Dómarar úr Tjaldur:** Trygvi Mortensen & Kári Hansen.

VÍF-Kyndil 25-16 (14-7):

# Leikandi lætt

**VÍF fekk valla sveittan fram í dystinum móti Kyndli, sum helst skulu frøast um, at Tjaldur ikki tykist hava møguleikan at flyta upp aftur í bestu deildina**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dysturin millum VÍF og Kyndil var enn ein staðfesting av, hvussu stórur munurin er millum ovaru og niðaru hálvu av bestu kvinnudeildini.

Flestu áskoðararnir mundu eisini undan dystinum vita á leið, hvat tey skuldu rokna við, og tað tók heldur ikki VÍF serliga langa tíð at sannføra um, at her kundi bara verða ein vinnari av dystinum. Ein munur á eini fimm mál varð alt fyri eitt bygdur upp, og so ráddi sum so bara um at halda fast. Og tað gjørdi VÍF eisini uttan stórvegis trupulleikar.

Fyri kappingina sum so var hetta ikki ein av teimum dystum, sum broytir serliga nógv upp á stigatalvuna, tó at VÍF við sigrinum vann seg upp um Neistan, sum jú tapti fyri Stjørnuni.

Heldur ikki hjá VÍF mundi dysturin hava stórvegis at týða, annað enn at halda battaríunum koyrandi, nú seinna hálvlfinalan móti VB stendur á skránni. Ivaleyst verður tað júst tann dysturin, sum hevur største týdningin í hugaheiminum hjá Vestmanna-kvinnunum í løtuni. Dystirnir í landskappingini móti hinum oddaliðunum eru allir settir á skránna einaferð í mars mánaði, so í so máta eiga áskoðararnir í Vestmanna ikki at rokna við tí heilt stóra spenninginum.

Hjá Kyndli eru tað hinvegin dystirnir móti hinum botnliðunum, sum munnu standa fremstir í huganum. Her hevur liðið enn møguleikan at lyfta sær nakað á stigatalvuni, og miðskeiðis í næstu viku býðst helst møguleikin til hetta, tá Kyndil vitjar á Skála. Verður tann dysturin vunnin, so heldur grøna havnarliðið framvegis fast í møguleikanum um at lyfta sær av botnsessinum. Um ikki, so skulu tær helst bara vera fegnar um, at Tjaldur er á niðasta plássinum í aðru deild, og tí ikki tykist hava møguleika at troka seg upp í bestu deildina aftur.



*VÍF hevði at kalla ongar trupulleikar sunnudagin, tá munurin millum ovaru og niðaru hálvu í bestu kvinnudeildini enn einaferð varð framsýndur*
*Savnsmynd*

### Dysturin í tølum

**VÍF-Kyndil 25-16 (14-7)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sóley Mikkelsen 6, Ioana Rápa 4(3), Jacklin Durhuus 4, Irina Radovici 4, Fríða Marjunardóttir 3, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3, Eydna Joensen 1
**Kyndil:** Annika Thomsen 4, Randi Wardum 4(1), Súsanna Petersen 2, Linda Weihe 2(1), Anja Heinadóttir 2, Fríða Petersen 1(1), Hildur Mikkelsen 1
**Brotskøst:** VÍF 4, Kyndil 3
**Útvísingar:** VÍF 3, Kyndil 3
**Dómarar úr Neistanum:** Kristian Johansen & Sámal Hansen.





*Nú endaspælið av álvara er komið í gongd, er trupult at fáa eyga á nakað lið, ið kann hótta Stjørnuna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Neistin-Stjørnan 27-24 (12-19):

# Stjørnan avgjørdi beinanvegin

**Í dystinum millum kvinnuliðini hjá Neistanum og Stjørnuni í Havn sunndagin, gjørdi Stjørnan bart beinan vegin, og tískil gjørdist dysturin ongantíð spennandi**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*

Lagt var upp til ein spennandi dyst í endaspælinum hjá kvinnum, tá ið oddaliðið Stjørnan sunnudagin var á vitjan hjá Neistanum í Havn. Men tað var skjótt, so høvdu kvinnurnar úr Klaksvík víst, hví tær eru oddalið.

## Ferð á beinanvegin

Tær reyðklæddu kvinnurnar úr Stjørnuni høvdu ongar ætlanir um at taka sær av løttum í dystinum móti Neistanum sunnudagin. Tær vóru tendraðar frá fyrsta bríksli, og tað gekk ikki long tíð, so høvdu tær lagt sjógv ímillum seg og heimaliðið. Neistaliðið bleiv tikið á bóli av skjóta álopsspælinum hjá Stjørnuni, og skotini fuku um oyruni hjá Helenu í málinum hjá Neistanum.

Eftir fyrstu tjúgu minuttirnar av dystinum hevði Stjørnan lagt seg á odda við átta málum, 16-8, og so var dysturin í veruleikanum avgjørdur. Tað tóktist sum um oddaliðið hevði eitt gear meiri enn Neistin, og serliga væl lá fyri hjá Stjørnuni at revsa neistakvinnurnar, tá ið hesar høvdu mist bóltin í álopi. Tað var eitt-tvey-trý, so høvdu kviku kvinnurnar úr Klaksvík skorað í hinum endanum.

Eftir at Stjørnan hevði lagt seg trygt á odda, dovnaði dysturin fullkomiliga. Neistin royndi at gera nøkur sprell viðhvørt, men hvørja ferð svaraði Stjørnan aftur. Tá ið komið var til hálvleiks vóru gestirnir á odda við sjey málum, 19-12.

## Hálvleikur uttan spenning

Seinni hálvleikur var meiri at kalla ein avgreiðsluspurningur. Tað tóktist sum um bæði liðini høvdu staðfest, at dysturin var avgjørdur, og tískil ráddi bara um at fáa hann avgreiddan. Gaman í royndu liðini at gera onkran vørr, og høvdu vengurnir hjá Stjørnuni verið eitt sindur meiri neyvir, hevði sigurin hjá klaksvíkingum verið væl størri, enn hvat hann var. Tað skal eisini sigast, at Helena Dam Poulsen í málinum hevði fleiri góðar bjargingar.

Einu løtuna nærkaðist Neistin nakað, men so gjørdi Stjørnan aftur bart og skoraði fýra ferðir á rað, og so var tann vandin av.

Leikur gekk rættuliga javnt á restina av hálvleikinum, og tá ið tíðin var farin, hevði oddaliðið Stjørnan vunnið ein sera tryggan sigur 34-27!

## Stjørnan hevði fleiri hóttanir

Tað var týðuligur styrkismunur á liðunum báðum. Hjá Neistanum er Simona Dzygyte nógv tann vandamiklasti leikarin, og hóast hon bleiv mansvard størsta partin av dystinum, eydnaðist tað henni at skora heili 12 mál. Hinvegin er álopsspælið hjá Neistanum ógvuliga skert, tá ið Simona verður mansvard, og tað var sjón fyri søgn sunnudagin. Álopini hjá havnarliðnum vóru lang, og mangan sá tað út til, at tær vóru í iva um, hvør skuldi royna seg.

Hjá Stjørnuni hinvegin var heilt øðrvísi. Har vóru tað nógv, ið bjóðaðu seg fram, og tá ið eitt nú Alina Olaru og Katarina Stjepanov blivu mansvardar seint í dystinum, tóku aðrar, eitt nú Joan M. Djordjevic og Anna Kristina Samson, yvir og smekkaðu bóltarnar í kassan.

## Hvør tekur Stjørnuna?

Nú endaspælið av álvara er komið í gongd, er trupult at fáa eyga á nakað lið, ið kann hótta Stjørnuna. Komandi sunnudag koma vágskvinnur á vitjan í Klaksvík, og vinnur Stjørnan tá, er neyvan nakar ivi um, at tær gerast føroyameistarar í ár.

Sjálvsagt skal ein ikki taka munnin ov fullan, men staðfestast má, at tað er trupult at ímynda sær, at nakar ger nakað við Stjørnuna. Einasti møguleiki tykist verða VB, men vágskvinnur hava ikki somu breidd sum tær í Stjørnuni, og tað kann vísa seg at gerast avgerandi leikluturin í kappingini um føroyameistaraheitið 2004.

### Dysturin í tølum

**Neistin-Stjørnan 27-34 (12-19)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Simona Dzygyte 12(1), Lív Sørensen 4, Ása á Neystabø 3, Lina Audryaryte 2, Susan M. Brockie 2, Marjun Tróndarson 2, Unn Kragesteen 1, Mildrið Jacobsen 1
**Stjørnan:** Katarina Stjepanov 12(6), Joan M. Djordjevic 6(3), Alina Olaru 5, Annika Ljósstein 4, Una Olsen 3, Anna Kristina Samson 2, Bára Skaale Klakstein 2
**Brotskøst:** Neistin 4(1), Stjørnan 13(9)
**Útvísingar:** Neistin 6, Stjørnan 3
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Hannis Wardum – eingir trupulleikar av einari yvirkomiligari uppgávu.

# Claus aftur í Bournemouth

Hálvi føroyingurin, Claus bech Jørgensen, hevur higartil í hesum kappingarárinum leikt við Coventry, eftir at hann annars hevur gjørt vart við seg í Bournemouth og Bradford í nøkur ár.

Men hóast skiftið var ætlað til at lyfta Claus Bech Jørgensen enn longur upp á ensku fótbóltstindarnar, so hevur hetta gingið eftir vild.

Coventry hevur langt ífrá staðið seg somikið væl, sum vónirnar annars vóru til undan kappingarárinum, og at væl umtókti venjarin, Gary McAllister, hevur biðið um farloyvi frá starvinum, tí hann vil vera meira hjá sjúku konu síni, hevur ikki betrað um støðuna í so máta.

Fyri Claus Bech Jørgensen hevur avleiðingin verið, at hann restina av hesum kappingarárinum verður aftur í Bournemouth, har enska ævintýr hansara byrjaði.

Og í fyrstu atløgu er í øllum førum líkt til, at skiftið loysti seg. Um vikuskiftið leikti Bournemouth á heimavølli móti QPR, sum er á øðrum plássi í deildini, og hendan dystin vunnu Claus og teir við einum máli móti ongum.

Bournemouth er nú á 11. plássi, men tað eru bert trý stig upp til sessirnar, sum geva atgongd til sonevndu play-off dystirnar, har seinasti uppflytarin skal finnast.